# Planet Awards – ársins veitsla

**Leygarkvøldið fara føroyski ungdómsportalurin Planet.fo og Sosialurin at lata heiðurslønir til føroyskan tónleik. Hetta verður gjørt á stóra gallatiltakinum á Hotel Føroyum, Planet Awards. Har tónleikur, heiður og stás renna saman til ársins veitslu.**

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nelly Furtado | All Good Things (Come To An End) |
| 2 | Take That | Patience |
| 3 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 4 | Red Hot Chili Peppers | Snow (Hey Oh) |
| 5 | Teitur | Don´t Want You To Wake Up |
| 6 | Gwen Stefani | Wind It Up |
| 7 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 8 | Beyoncé | Irreplaceable |
| 9 | Kristleif | Number Of The Beast |
| 10 | The Pussycat Dolls | I Don't Need A Man |
| 11 | Akon feat. Snoop Dogg | I Wanna Love You |
| 12 | Disturbed | Ten Thousand Fists |
| 13 | P Diddy ft. Christina Aguilera | Tell Me |
| 14 | Fergie | Fergalicious |
| 13 | Martin Joensen og hinir ft. Eivør | Kavin Kom |

### Eykaløg

| | |
|---|---|
| Crew 7 | Eye Of The Tiger |
| Nephew | Science Fiction og Familjen |
| Jim Jones | We Fly High (Ballin) |
| Hinder | Lips Of An Angel |
| The Dreams | Babu |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nephew | Science Fiction og Familjen |
| 2 | Nelly Furtado | All Good Things (Come To An End) |
| 3 | Take That | Patience |
| 4 | Thomas Helmig | Op og Ned |
| 5 | Anders & Ricky | Nik & Jay Kompot |
| 6 | Chris Cornell | You Know My Name |
| 7 | U2 & Green Day | The Saints Are Coming |
| 8 | Killers | When You Were Young |
| 9 | Nephew | Igen & Igen & |
| 10 | Dúné | Bloodlines |
| 11 | Infernal | Self Control |
| 12 | Justin Timberlake feat T.I. | My Love |
| 13 | Red Hot Chili Peppers | Snow (Hey Oh) |
| 14 | Christina Aguilera | Hurt |
| 15 | Panic! At The Disco | But it's Better If You Do |
| 16 | Nordstrøm | Du og Jeg |
| 17 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 18 | Scissor Sisters | Land Of A Thousand Words |
| 19 | Trolle Siebenhaar | Sweet Dogs |
| 20 | Hush | For All The Right Reasons |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mika | Grace Kelly |
| 2 | Just Jack | Starz In Their Eyes |
| 3 | View | Same Jeans |
| 4 | Jojo | Too Little Too Late |
| 5 | Eric Prydz vs Floyd | Proper Education |
| 6 | Leona Lewis | A Moment Like This |
| 7 | Ordinary Boys | I Luv U |
| 8 | Take That | Patience |
| 9 | Jamie T | Calm Down Dearest |
| 10 | Booty Luv | Boogie 2nite |
| 11 | Mason | Exceeder |
| 12 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 13 | Cascada | Truly Madly Deeply |
| 14 | Klaxons | Golden Skans |
| 15 | Sharam | Patt (Party All The Time) |
| 16 | Akon feat. Snoop Dogg | I Wanna Love You |
| 17 | Billie | Honey To The Bee |
| 18 | P Diddy ft. Christina Aguilera | Tell Me |
| 19 | Freemasons ft. Christina Aguilera | Rain Down Love |
| 20 | Good The Bad & The Queen | Kingdom Of Doom |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beyonce | Irreplaceable |
| 2 | Akon ft. Snoop Dogg | I Wanna Love You |
| 3 | Fergie | Fergalicious |
| 4 | Nelly Furtado | Say It Right |
| 5 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 6 | Jim Jones | We Fly High |
| 7 | The Fray | How To Save A Life |
| 8 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 9 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 10 | The All-American Rejects | It Ends Tonight |
| 11 | Bow Wow ft. Brown & Austin | Shortie Like Mine |
| 12 | Justin Timberlake | What Goes A |
| 13 | Ludacris ft. Mary J. Blige | Runaway Love |
| 14 | Hinder | Lips Of An Angel |
| 15 | Unk | Walk It Out |
| 16 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 17 | Ciara | Promise |
| 18 | Lloyd ft. Lil' Wayne | You |
| 19 | Fat Joe ft. Lil' Wayne | Make It Rain |
| 20 | Paula DeAnda ft. The DEY | Walk Away |

sound



Veitslan kann fáa bráð av felagssangi, tá Páll Finnur Páll fer á pallin

Mynd: Jens Kr. Vang

PLANET AWARDS
**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo

Føroyskur tónleikur hevur tikið stór stig framá seinnu árini, og í 2006 hava føroysk tónlistarfólk gjørt vart við seg bæði úti og heima. Vit kunnu nevna, Teit, Lenu, Týr, Høgna Lisberg og Gestir, ið øll á hvør sín hátt tóku enn eitt stig út í heim í farna árinum.

Karmar og mannagongdir verða í stóran mun tær somu sum í fjør. Hotel Føroyar leggur hølið til og talan verður um stórfingna Galla veitslu.

Virðislønir verða lætnar fyri bestu útgávu, besta bólk/einstakling, besta sangara, bestu songkvinnu, besta útlendska bólk/einstakling og besta nýggja bólk/einstakling. Harafturat verður eisini eitt serligt Planet-herðaklapp latið einum persóni, sum hevur avrikað nakað serligt í føroyskum tónleiki gjøgnum árini, í fjør var tað Kristian Blak, ið fekk hetta serliga herðaklapp.

### Dómsnevnd og almenningur gera av

Ein serlig dómsnevnd við fimm persónum fer at tilnevna bólkar og tónleikarar í teimum ymsu greinunum, og síðani verður atkvøtt um hesi uppskot.

Limirnir í dómsnevndini atkvøða hvør í sínum lagi, og teirra samlaðu atkvøður telja helmingin av úrslitinum.

Hin helmingin av úrslitinum skal almenningurin gera av. Fólk fáa møguleikan at atkvøða umvegis sms, og síðani verða atkvøðurnar hjá fólki og dómsnevndini taldar saman til eitt endaligt úrslit, sum verður almannakunngjørt á Planet Awards á Hotel Føroyum.

Atkvøtt verður tó ikki um serliga Planet herðaklappið. Hetta verður avgjørt av fólkunum handan Planet Awards.

### Planet Awards

Á Planet Awards verður góð buffet at fáa, og avdúkingarnar av, hvør hevur vunnið tær ymsu heiðurslønirnar. Millum handanirnar verður nakað av tí besta á føroyska tónleikapallinum at hoyra: Guðrið Hansen, Boys In A Band, Páll Finnur Páll, 200, Rókur og danska superstjørnan Bryan Rice Eftir at heiðurslønirnar eru lætnar, verður afterparty við dansi har Showmenn spæla.



Danin Bryan Rice fer at framføra sini hitt fyri veitslukløddu gestunum

Mynd: bryanrice.dk